# Alt er á gosi í Gøtu

**Gøta verður í miðdeplinum hetta vikuskiftið. G! Festivalurin og Gøtustevna bjóða eina ørgrynnu av tiltøkum, og Erling politistur, sum kemur til Gøtu at syrgja fyri sátt og semju, verður helst arbeiðsleysur, tí nú eru øll samd í Gøtu**

STEVNUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fríggjadagin varð hol sett á tey mongu tiltøkini, sum verða í Gøtu um vikuskiftið.

Í fleiri enn 20 ár hava gøtumenn havt eina summarstevnu hesa árins tíð, og seinastu trý árini er G! Festivalurin eisini komin afturat. Tað hevur við sær, at tað er nógv at fara til í Gøtu hesar dagar.

Á stóra pallinum á sandinum í Syðrugøtu er tónleikur frá seinnapartinum og út á náttina bæði fríggjadag og leygardag, og sunnudagin, tá ið G! Festivalurin hevur spælt sín seinasta tóna, verður nógv annað á skránni í Gøtu.

– Vit vænta at fáa eina góða stevnu. Tað er sjáldan, at tað eru so nógv góð tilboð at fara til í tríggjar dagar, heldur Jógvan Gregersen, sum er formaður í Gøtu Ítróttarfelag, ið stendur fyri Gøtustevnu.

## Alt passar saman

Tað var eina tíð líkt til, at G! Festivalurin og Gøtustevna skuldu haldast í hvør sínum lagi í nánd av hvørjum øðrum, og hetta komst av, at fyrireikararnir av G! Festivalinum og GÍ ikki kundu semjast um onkur viðurskifti. Mikukvøldið bar tó til at semjast, og nú eru skráirnar fyri festivalin og stevnuna samantvinnaðar, so at alt passar saman.

Í bløðunum í gjár var nýggja skráin fyri Gøtustevnu lýst, og broytingar vórðu gjørdar, so at stór tiltøk á G! festivalinum og Gøtustevnu ikki bresta saman.

Fríggjadagin var lagt fyri við tónleikinum á G! Festivalinum, og tað eru nógv spennandi nøvn á skránni. Úr Danmark koma Kashmir, úr Svøríki Lisa Ekdahl og úr Føroyum og aðrastaðni koma nógv onnur góð nøvn.

## Gøtustevna

Tivoli verður allar dagarnar á festivaløkinum í Syðrugøtu, í turkihúsinum verður gokart-koyring og í grótbrotinum paint-ball skjóting. Leygarkvøldið spælir All That Rain til dans á Kambsdali, og midnáttarrøða verður á sandinum leygarkvøldið trý korter eftir midnátt.

Sunnudagin verður nógv á skránni. Millum annað fara Trølla Pætur og hansara harkalið at undirhalda á sandinum. Erling politistur kemur til bygdina, men gøtumenn halda, at hann verður arbeiðsleysur, tí nú klandrast eingin í Gøtu longur. Kanska trøllini tó klára at beina fyri friðinum...

Sunnudagin klokkan hálvgum seks kunnu fólk uppliva tað, sum nógv teirra droyma um – nevniliga at fótbóltsdómarar detta á sjógv.

Eitt afturvendandi tiltak í Gøtu hevur verið sjógvtiltakið, og í ár skal gangast á vatninum – ella næstan. Runnið verður á einum enda út á sjógv, og fótbóltsdómarar fara at leggja fyri. Onnur kunnu eisini bjóða seg fram, og tað ber til at vinna eina uttanlandsferð frá Atlantic Airways fyri tann, sum er skjótast í vendingini.

Frásøgumenn vera Torbjørn Jacobsen, Árant Hansen og Jørgin Evald Solmund, sum hevur verið ivasamur, men væntandi verður til dystin fús.

Eftir tiltakið á sjónum fer Gøtu kommuna at heiðra Haldgrím Gregersen, sum hevur fingið ein heiðursgávu frá FIFA.

Alt hetta og meira verður at fáa við í Gøtu um vikuskiftið.

Og tað er ikki bara í Gøtu ein dag – tað er í fleiri dagar...



*Fløggini veitra í Gøtu í hesum døgum*

Føroyskir rockbólkar:

# Fáa Ísland at skelva



*Manningarnar á Speaker og 48 Pages her saman við Karl Anton Klein, ferðaleiðara og Sámal Rasmussen, »roadie«, áðrenn farið varð við Norrønu til Íslands*

**Mikudagin fóru tveir av ungu og nýggju rockbólkunum í Føroyum, Speaker og 48 Pages til Íslands á konsertferð**

TÓNLEIKUR

Við Norrønu til Íslands mikudagin fóru tveir av ungu og nýggju rockbólkunum í Føroyum, Speaker og 48 Pages. Farið verður runt alt Ísland at halda konsertir komandi tvær vikurnar. Bólkarnir hava sín uppruna í Margarinfabrikkini í Havn, har tað undir leiðslu og íblástri av Karl Anton Klein, undirvísara og tónleikara, eru lagdir lunnar undir ikki bert fleiri vælumtóktar bólkar, men eisini tónleikaútgávu. Herfyri gávu teir báðir bólkarnir saman við Zink og Lama Sea út fløguna Ampaljóð, sum gongur sum heitt breyð kring landið. Umframt alla útgerðina hava teir so eisini hesa fløguna við sær til Íslands, har teir vóna at selja nakað til íslendskan ungdóm, sum dámar hetta slagið av tónleiki.

– Hetta eru ungir og nærlagdir tónleikarar, sum vit kunnu vænta okkum nógv av í framtíðini. At lata teir sleppa at royna seg á fremmandum palli verður vónandi til felags íblástur fyri teir, soleiðis at teir koma aftur heimaftur við nógvum upplivingum og enn størri tónleikaførningi, enn tá teir fóru avstað sigur ein rættiliga avkláraður Karl Anton Klein.

Hann hevur saman við bólkunum gjørt eitt stórt arbeiði fyri at leggja hesa spennandi ferð til rættis. Eitt nú hevur verið skipað fyri konsertum og tiltøkum í bæði Havn og Fuglafirði. Karl Anton fegnast eisini um, at so mong hava viljað stuðlað ferðini.

Ferðalagið kom til Seydisfjarðar hósdagin í øllum góðum. Spælt varð sama kvøld í ungmannafelagshúsi í býnum. Higani gongur leiðin víðari til Húsavík, Aðaldal, Akureyri og síðani til Reykjavík og aftur. Stegðað verður í nógvum øðrum plássum á leiðini eisini umframt at bólkarnir eisini fara at vitja fleiri av teimum kendastu náttúruvøkru plássunum í Íslandi.

Luttararar á ferðini eru 48 Pages: Frans Galán, Bjartur Dal-Christiansen, Bartal Læarsson og Eyðun Müller Thomsen. Speaker manningin er: Janus Ramussen, Bogi Berg, Jan Jensen og William Souvy Olsen.

Stuðlar eru m.a. Mentamálaráðið, Mentunargrunnur Landsins, Grunnur Nuuk Reykjavík Tórshavn, Fitur, Tórshavnar Kommuna, mentanarnevndin, Tórshavnar Skipasmiðja, Margarinfabrikkin, Storno, Oda Andreassen, Bacalao, Kongshavnar Útgerðarfelag o.o.




*Forsíðan á snotuliga Føroyaprentfaldaranum, sum føroysku bólkarnir hava við sær til Íslands*



## Krabbagágga í egnum landi:

### Lonely Planet um samkynd ferðafólk:

»Kanska orsakað av sterku støðuni hjá kristnu Luthersku kirkjuni í Føroyska samfelagnum, eru viðurskiftini hjá teimum samkyndu ikki eitt nógv umtalað evni í Føroyum. Hóast føroysk fólk á ongan hátt eru ótolerant, verða samkynd pør rádd til at vera stillfarandi fyri ikki at øsa nøkur av teimum meira siðbundnu lokalu. Ongar barrir ella náttklubbar serliga fyri samkynd eru á oyggjunum.«

### Lonely Planet um siðbundnan føroyskan mat:

»Tað fyrsta vitjandi leggja til merkis við siðbundna føroyska kostinum er manglandi grønmetið afturvið altíð hjástadda kjøtinum og eplunum. Men partur av stuttleikanum við at ferðast er at uppliva ymiskar livihættir, og føroyski kosturin kann ikki vera SO vánaligur – miðal livialdurin millum føroyingar er ein tann hægsti í heiminum.«

### Lonely Planet um bussambandið:

»Langfara ruturnar hjá Bygdaleiðum eru framúr. Tær fylgja einari neyvari og hentari ferðaætlan og sambinda, saman við ferjutænastunum, so at siga hvønn krók av landinum, harímillum nøkur rættiliga fjarskotin støð so sum Trøllanes á Kalsoy, Dalur á Sandoy og Bøur í Vágum.«

### Lonely Planet um rúsdrekka:

»Fram til 1992 var hugburðin hjá føroysku stjórnini mótvegis rúsdrekka á markinum til tað paranoida. Síðan tá er hugburðurin búnaður, og nú er møguligt at keypa sær eitt glas av sterkum á loyvishavandi matstovum, barrum og í náttklubbum. Men fyri ferðafólk er almenni føroyski hugburðurin mótvegis alkoholi framvegis eitt skemtiligt evni.«

»Hóast fyribyrgjandi átøkini hjá kristnum og fráhaldsrørslum er alkoholisma ein lutfalsliga stórur trupulleiki í Føroyum. Tað eru tó ikki so nógv full fólk at síggja nú sum áðrenn rúsdrekkalógin varð linkað, og tað kann kanska vera ein ábending um effektivitetin av forboðum.«

### Lonely Planet um at tumla:

»Um tú tolir veðrið, er tað at tumla bæði ein góður máti at koma runt í Føroyum og ein góður máti at møta lokalu fólkunum. Harafturat skal tú ongantíð bíða leingi eftir at verða tikin uppí ein bil, um ikki tú ert sera óheppin. Bilar steðga hóast tú bara gongur fram við vegnum uttan at hava tummilin úti.

Hóast tað helst er tryggari at tumla í Føroyum enn nakra aðrastaðni í Europa, so er tað ikki ein fullkomiliga tryggur máti at koma runt. Kvinnur eiga at vísa vanligt varsemi áðrenn tær fara uppí bilar, og øll eiga at ansa eftir ikki at fara í bilar, har førarin er fullur.«

### Lonely Planet um Føroyar:

»Hetta er eitt av hesum loyndarliga langt burtur støðunum, í ætt við Aleutoyggjar og Falklandsoyggjar, sum tey flestu høvdu havt ilt við at funnið á einum korti, fyri ikki at tala um havt ætlanir um at vitjað. Hesir 18 blettarnir av landi í Norður Atlantshavi tykjast at fáa sera lítla umtalu, og, hóast teir bert eru eitt hanagleiv frá europeiska meginlandinum, hugsa europear sjáldan um teir.

Av tí sama eru vitjandi vanliga púra ófyrireikað til óreingiliga vakurleikan í føroyska landslagnum. Sæð frá sjónum ein góðveðursdag (sum í Føroyum merkir alt frá smáskýggjaðum himli til sirm) eru brøttu bergini, lagkøkufjøllini, brimið og milliónirnar av sjófuglum, sum stoyta seg niður móti litríku føroysku fiskibátunum ein estetiskur skelkur. Tað er júst soleiðis, sum tú kundi væntað at »baldrut norðuratlantslond« síggja út. Legg løgna vitan á óslætta tanganum afturat, og tú hevur tað, sum málningar avmynda.«

# Føroyar sæddar ígjøgnum sólbrillur

*Krabbagággan skrivar:*

Hvat fær útlendingar at koma til Føroya at ferðast? Hvat vænta útlendsk ferðafólk sær her, hvat verður teimum lovað, og hvat fáa tey í veruleikanum?

Hesir spurningar eru mær rættiliga ósvaraðir, nú áðrenn leiðin gongur út í Føroya land við ryggsekki á baki. Ætlanin er at síggja støð og møta fólki, bæði lokalum og øðrum ferðandi, og sum frá líður at fáa eina hylling av, hvussu Føroyar eru sum ferðamannaland.

Men alt veldst um eygað, sum sær, og gestsins eyga er gløgt, verður sagt. Ikki altíð tí at gesturin er so nógv gløggari enn hini, men tí at gesturin ikki í sama mun er bundin at fastgrógvnum vanum í sínum eygleiðingum og harvið hevur lættari við at síggja tað, sum onnur ikki geva sær far um.

Fyri at fáa eina fatan av Føroyum sum ferðamannalandi er tískil neyðugt at royna at leggja egnar fordómar og hugsanir til viks eina løtu fyri at hava møguleika at síggja hetta landið, sum ein ferðamaður kann hugsast at síggja tað.

### Halgabók ferðamansins

Í eini roynd at koma afturum sólbrillurnar á útlendska ferðamanninum og síggja Føroyar uttanífrá við hansara eygum, havi eg kagað í kendu avstralsku ferðahandbókina Lonely Planet, sum í spølni ofta verður umtalað sum halgabók ferðamansins.

Lonely Planet bøkurnar eru trúgvir ferðafelagar hjá flest øllum fjakkaranum og munnu hava tænt mongum føroyskum fjakkara væl, og meðan hann hevur verið langt av landi skotin.

Men fyri eina avstralska ferðahandbók eru Føroyar eins fjarskotnar og Fifi oyggjar og Sumatra, og í bókini »Lonely Planet – Iceland, Greenland and the Faroe Islands« verða tey trý londini í útnorðri viðgjørd sum ferðamál á sama gjølliga og sakliga hátt sum aðrar bøkur í røðini viðgera aðrar partar av heiminum. Her verður einki spaltupláss brúkt til romantiserandi gliturmyndir – bara til fakta og praktiskar vegleiðingar.

Omanfyri eru nakrir úrdráttir úr bókini (umsettir beinleiðis úr avstralskum).



### Krabbagággan

Á síni ferð skal krabbagággan hjá Sosialinum liva fyri í mesta lagi 300 krónur um dagin. Fyri hesa upphædd skal hon gerast mett hvønn dag og helst sova undir føstum taki hvørja nátt, ásannandi at Føroyar ikki eru nakað tjaldingarparadís.

Krabbagággan er ókunnufólk mestsum alla aðrastaðni enn innanfyri ringvegirnar í Havn, og velur tí so ofta sum gjørligt fyriskipaðar útferðir framum at fara einsamøll til gongu.

Ferðaseðla- og útferðaprísir verða ikki íroknaðar í tær 300 krónurnar, sum krabbagággan hevur at liva fyri, men hon fer at lata orð falla, um hesir tykjast henni ov dýrir, tí eisini her roynir hon at vera sparin.

Krabbagággan hevur ongan bil, men tveir tumlar. So sært tú nakran standa í vegjaðaranum og veipa við tumlinum, kann tað væl vera okkara krabbagágga.

### Hjálp krabbagágguni

Tú kanst senda krabbagágguni uppskot og góð ráð um ferðamál og annað á teldupost adressuni:

krabbagaggan@sosialurin.fo